# Serskeið á Søgu- & Samfelagsdeildini

**Í vár bjóðar deildin undirvísing í hesum skeiðum:**

## Altjóða politikkur og altjóða skipan

**Lærari:** *Herluf Sigvaldsson.*
**Tíð og stað:** *Týsdagar kl. 07.50 - 09.25 á Sjómansskúlanum.*

Skeiðið er fyrst og fremst ætlað lesandi, ið eru komin nakað áleiðis í lesnaði við lærdan háskúla, og lidnum kandidatum við áhuga fyri at leggja aftrat vitan síni.

Endamálið við skeiðnum er at geva eitt grundleggjandi innlit í námsgreinina altjóða politikk. Altjóða skipanin verður í høvuðsheitum sundurgreinað við atliti at teim ymsu eindunum á altjóða leikpallinum og samvirkanini teirra millum. Høvuðstátturin í seinnu helvt av skeiðnum verður altjóða samráðing, heruppií diplomatiskar semingsroyndir. Skeiðið endar við einum samráðingarspæli.

Skeiðið fevnir um 30 undirvísingartímar, ið svara til 15 ECTS ella 1/4 lestrarár.

Undirvísingin verður ein blanding av fyrilestrum og kollokvium. Uppgáva og munnlig framløga í sambandi við undirvísingina telja 1/3 av prógtøkukarakterinum. Skeiðið endar við munnligari próvtøku, ið telur 2/3 av endaliga próvtøkutalinum.

## Grundskeið í lóg

**Lærarar:** *Kári á Rógvi, Birta Biskopstø, Jonhard Klettheyggj og Jógvan Elias Winther Poulsen.*
**Tíð og stað:** *Týsdagar og hósdagar kl. 14.00 - 16.00 á Náttúruvísindadeildini, Nóatún 3.*

Skeiðið er ætlað fólki við miðnámsútbúgving, hægri útbúgving ella viðkomandi royndum. Skeiðið er ætlað at vera partur av hægri útbúgvingum, har lógkunnleiki er ein fyrimunur.

Tey lesandi fáa ígjøgnum dømi úr lógum, kunngerðum, dómum og øðrum eina fatan av háttalagnum hjá lógkønum (juristum). Venjingar vera, har tey lesandi sjálvi sleppa at finna á lógir í bókum, teldum og hjá stovnum.

Skeiðið fevnir um 56 undirvísingartímar, ið svara til 15 ECTS ella 1/4 lestrarár.

Skeiðið er skipað í tveir høvuðspartar. Í almenna partinum læra tey lesandi, hvussu lógkøn skipa, finna, meta saman, smíða og royna lóg. Í serliga partinum fáa tey lesandi innlit í stjórnarlóg, fyrisitingarlóg og altjóðalóg, umframt einstøk onnur evni.

Tey lesandi skula skriva tvær uppgávur, sum tey fáa høvi at leggja fram. Tann betra teirra telur 1/3 av próvtalinum. Skeiðið endar við skrivligari próvtøku ið telur 2/3 av endaliga próvtøkutalinum.

Umsóknarfreistin er 6. februar 2002.

Umsóknarbløð fáast á www.setur.fo ella við av venda sær til

**Fróðskaparsetur Føroya**
Søgu- & Samfelagsdeildina,
J. C. Svabos gøtu 7,
FO-100 Tórshavn.
Tlf. 317009.
ssd@setur.fo


## HEILSANIR



Hjartaliga takka vit øllum, sum við gávum, fjarritum og heilsanum gjørdu hjúnabandsdag okkara 4. august 2001 ógloymandi og hugnaligan. Serliga tøkk til familjuna, sum setti ein serligan dám á dagin.
**Heilsan, Gunnvá og Mikael**





**Góði Thomas**
Hjartaliga tillukku við piparinum 25. jan. Nú mást tú skunda tær.
**Heilsan, gita hvør**



**Seinkað heilsan**
Hervið ein heilsan til brúðarparið Joensen, og eitt hjartaliga tillukku til brúðgommin, sum fylti 30 ár tann 22. jan.
**Heilsan, vinir**



**Góða Mary**
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum. Jesus signi teg ynskja
**Árni, Oddvør, mamma og babba**



**Góði, fitti John**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum, ið var 23. jan.
**Muss og klemm frá ommu, abba og fastur í Vestmanna**



**Hey, hon sjálv!**
Hjartaliga tillukku við degnum tann 24. januar ynskir
**»maðurin«**

### Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ......................................................................
Bústaður: ..................................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ...................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**



## ÚT AT KOYRA

### Hyundai stóra framgongd



Hjá Hyundai Motor Co. í Korea er stór framgongd í bilasøluni, bæði til heimamarknaðin og til útflutnings. Seldir vóru 1.6 milliónir bilar í 2001, og tað var ein vøkstur uppá 4.3%. Útfluttir vóru mest av Hyundai Accent.

*Kelda: Hyundai Bil Import A/S*

### 25 ár við Saab turbo



Í 1977 vóru teir fyrstu 100 Saab 99 framleiddir til sera intensiva testkoyring. Árið eftir kom bilurin í framleiðslu við 4 syl. motori og 154 hk. Kanningar vístu, at ein 6 cyl. motorur við somu effekt vigaði umleið 50 kg meira og brúkti 30 prosent meira bensin.

*Kelda: Motor Magasinet*

### Hyundai í USA



Av innfluttum bilmerkjum í USA er Hyundai vorðnir nr. 2, eftir Toyota, ið eru nr.1 og Honda sum nr.3. The Korea Automotive Research Institute upplýsa, at innfluttir vórðu 600.000 koreanskir bilar til USA í 2001. Sekstan ár eru liðin síðan fyrstu koreansku bilarnir komu til USA.

*Kelda: Hyundai Bil Import A/S*

# Ger stóran mun at økja ferðina við 10 km/t

Hesar strikumyndir visa at stórur munur er á at hække ferðina við 10 km/t. Tey, sum hava koyrt á koyritekniskum breytum, hava sannað, at um ferðin bert verður hækkað við 5 km/t, hevur tað eisini stóra ávirkan:

*Kelda: RFF - Petur J. Sigvardsen*




*Henda strikumynd sýnir okkum 2 bilar, sum koyra ávikavist 90 og 100 km/t á turrum, frystum vegi. Hjá tí fyrra bilinum er viðbragdslongdin (reaktiónslongdin) 25 metrar og bremsulongdin 40 metrar, so steðgilongdin verður 65 metrar.*
*Hjá hinum bilinum, sum koyrir 100 km/t, er viðbragdslongdin nú 28 metrar og bremsulongdin 50 metrar, so steðgilongdin verður 78 metrar - ella 13 metrar longri enn hjá tí fyrra bilinum. Men tað, sum vit serliga skulu geva okkum far um, er, at tá ið tann fyrri bilurin er steðgaður, koyrir hin framvegis við o.u. 50 km/t.*




*Steðgilongdir hjá bilum á turrum og frystum vegi við ferð frá 30 til 110 km/t*

# Toyota Corolla Verso – barnavinarligur familjubilur



*Corolla Verso er ein MPV, ið skilir seg út frá hinum Corolla modellunum, við tað at hann hevur heilt øðrvísi design og er góðar 10 cm hægri*

*Mynd: Jens K. Vang*



*Sum nakað nýtt hevur Verso innbygdar barnastólar til børn millum 15 og 30 kg.*

*Mynd: Jens K. Vang*

**Eins og Yaris og Avensis hava Corolla nú eisini fingið ein Verso. Corolla Verso er ein bilur í stødd við Renault Scénic og Citroën Picasso. Verso hevur øðrvísi design og er góðar 10 cm hægri enn hinir Corolla bilarnir**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Corolla Verso skilir seg út frá hinum Corolla modellunum, við tað at hann hevur heilt øðrvísi design og er góðar 10 cm hægri. Í innrætting og stødd er hann nakað sum Renault Scénic og Citroën Picasso. Viðførisrúmið er 417 litrar. Viðvíkjandi útgerð og motorum er alt eins, uttan tað at Verso fæst ikki við 1.4 litur motorinum.

### Innbygdar barnastólar

Baksetrið kann flytast fram eftir fyri at økja um plássið í viðførisrúminum. Sum nakað nýtt hevur Verso tveir innbygdar barnastólar til børn millum 15 og 30 kg. Gearstongin situr á niðara parti á instrumentborðinum og er sera løtt at handfara. Verso er ein rúmligur bilur, ið er væl egnaður til familjur við børnum.